## Fartelefonir og heilsa

Enn eru serfrøðingar ikki samdir um, um radiobygljur frá fartelefonum eru skaðiligar. Serliga er ógreitt, um vit verða ávirkað, um vit nýta hana í landa tíð. Tí er best at vera fyrivarin. Fyrsta ráðið er at lata vera við at trýsta telefonina ímóti oyranum, tí størri avstandurin er, minni er strálingin av elektromagnetiskum bylgjum. Enn betri er at nýta eitt sett, so tú ikki hevur telefonina í hondini. Eisini er eitt ráð frá danska brúkararáðnum, at børn mugu avmarka teirra nýtslu av telefonini, tí geva fartelefonir skaða, so er størri møguleiki fyri, at børn fáa skaða.



## Spariperur í ringt ljós

Ein kanning hjá danska brúkararáðnum vísir, at spariperur lýsa nógv verri, enn vanligu perurnar. Kanningin vísir, at sjálvt bestu perurnar hava trupulleikar at vera eins góðar og vanligu gløðiperurnar. Hinvegin eru spariperur fínar til hugnaliga innandura nýtslu, men kunnu ikki nýtast uttandura, tí tær fáa ofta trupulleikar við frosti. Men tað eru ymiskir veikleikar við spariperunum. Summar lýsa illa, summar lýsa illa at byrja við og summar broyta litirnar í rúminum.



*Lagt til rættis: Eirikur í Jákupsstovu*

# Stýr á kærleiks-pengum

Áðrenn eitt par flytur saman, er ofta torført at tosa um pengar, og at hava stýr á fíggjarviðurskiftum. Her eru nøkur tipp til tykkara, sum ætla at flyta saman

### Tosið um pengar frá byrjan

Tað er nokk so ósexut at tosa um pengar, men tit mugu tosa um pengar. Tí tað er munandi lættari at tosa um pengarnar, áðrenn tit koma í trupulleikar av teimum.

### Stýrið skuld

Um tit ætla at skuldarbinda tykkum saman, so merkir tað, at tit eru bundin saman, til skuldin er goldin. Hetta merkir tí, at um tit hefta tykkum saman soleiðis, so skal annar gjalda, um hin ikki kann. Tá er líka mikið, um tit framvegis eru saman ella ikki. Syrgi somuleiðis fyri, at bæði nøvn eru á prógvunum á lutum, har tit hefta fyri lánið saman. So annar ikki verður snýtt/ur.

### Nýtið sama banka

Tað sparir ofta tíð, um tit nýta sama banka, tá tit búgva saman og hava felags útreiðslur. Tí so kunnu tit hyggja at kontonum hjá hvørjum øðrum á netbankanum fyri at halda yvirblikkinum. Tað ber eisini til, at fáa fulmaktir til konturna hjá hvørjum øðrum, so tað er lættara at flyta pening ímillum tykkum. Hava tit hvør sín banka tekur hetta longri tíð.

### Hugsið um felagskontu

Ein góður háttu er at gjalda fastar upphæddir mánaðarliga fyri at rinda føstu útreiðslurnar. Hugsi um eina húsarhaldskontu, sum tit bæði hava kort til, tí so sleppa tit undan at skeldast um hvør keypir meiri smør ella vesipappír. Ein møguleiki er at hava eina felagsøkonomi, so er ein fyrimunur at hava felags lønarkontu, har tit hava hvør sítt visakort.

### Barnaútreiðslurnar

Um ella tá børn koma upp í parlagið, er tað ein stórur fyrimunur at gera av, hvussu tit rinda klæði, gávur, frítíðarvirksemi og skúla. Tað er lættast at gjalda helvtina í part, men tað týdningarmesta er at hava greiðar avtalur, so tit sleppa undan at kjakast um, hvat verður nýtt frá hvørjum til børnini

### Gerið fíggjarætlanir

Rokni útreiðslurnar eitt á fram í tíðina. Býti talið í 12, og koyri tað aftur í helvt, so tit kunnu rinda eins nógv á kontuna við føstum útreiðslum. Soleiðis sleppa tit undan hvøkkum og upp- og niðurtúrum í nýtslupengunum, tá SEV, telefon og trygging skulu rindast.

### Býtið útreiðslurnar

Hugi um tit skulu rinda eins nógv í láni, leigu og húsarhaldspeningi. Vinnur annar meiri pening enn hin, so kunnu tit fordeila soleiðis, at annar rindar prosentvís meiri enn hin, so tit hava umleið ein nógvar pengar eftir.

### Pensjónin skal við

Avtali, hvussu tit spara upp til aldurdómin. Hevur annar betri pensjón enn hin í arbeiðinum, so kunnu tit saman savna, so tit hava eins nógv til lukkuligu pensjónsárini.

### Keypa heim saman

Um tit keypa hús ella íbúð saman og ikki eru gift, so er ein stórur fyrimunur at gera eitt greitt býti, um tit skulu eiga helvtina í part, og hvussu skuld og vinningur skulu býtast, um tit flyta frá hvørjum øðrum aftur. Á sama hátt er ein fyrimunur at hava greiðar avtalur um størri lutir, so tit sleppa undan at blanda teir upp í samrøður, tá tit eru kedd, skuffað ella ill.

### Tryggið hvønn annan

Um tit liva saman, og annar doyr, so er ein øgiliga stórur fyrimunur at hava eina lívstrygging, so hjálpir tað einkjufólkinum at klára tíðina aftaná økonomiskt. Hóast stóra missin.

*Kelda: Danska brúkararáðið*